# Fróði til EB/Streym

Flytingarvindeygað stongdi mánadagin, men undan hesum hevur tað eydnast EB/Streymi at fáa sær ein verjuspælara afturat í hópin, nú Egil á Bø hevur valt at gevast. Fróði Clementsen hevur áður spælt við EB/Streymi, men í ár hevur hann aftur verið í barndómsfelagnum, B36. Hann tók tó eina skjóta avgerð, tá tað í dag stóð honum í boði at skifta til EB/Streym, og nú eru øll viðurskifti millum EB/Streym og B36 greidd, soleiðis at spæliloyvið kann flytast til EB/Streym longu í dag.



# Norskt krút til AB

AB skrivar á heimasíðuni, at avtalan við norska áleyparin hevur verið ávegis stóran part av kappingarárinum, men ikki fyrr enn nú hevur eydnast at fáa øll viðurskifti upp á pláss. Stig-Roar, sum er 27 ára gamal, kemur úr Korsvoll, sum spælir í næst bestu norsku deildini, og har hann hevur skotið nógv mál. Men hann hevur áður roynt seg hjá eitt nú Molde, sum spælir í fremstu norsku deildini. Í fyrstu atløgu er sáttmálin millum partarnar galdandi fyri restina av hesum kappingarárinum.



Niclas Niclasen heldur fyrsta steypið hjá Víkingi nakrantíð á lofti
Mynd: Álvur Haraldsen

# Meiri n

**Árvaknir frá byrjan og við einum vilja, sum tey ikki hava sæð í Sundalagnum í ár, bastu Víkingar EB/Streymi og gjørdust sostatt vinnarar av Løgmanssteypinum. Í Sundalagnum mugu tey hinvegin ásanna, at 2009 á ongan hátt er nakað eydnuár hjá teimum**

FÓTBÓLTUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

2009 skuldi vera árið. EB/Streymur hevði styrkt seg væl við monnum sum Pætur Dam Jacobsen og Paula G. Hansen, sum báðir hava verið á landsliðnum, umframt at brasilianski vinstri vongverjin hjá B36, Alex Santos, ið av mongum hevur verið mettur sum besti maður plássinum seinastu árini, eisini varð knýttur at hópinum hjá Sigfríði Clementsen og Magna Mohr.

Umframt tað tryggjaði EB/Streymur sær eisini unga og sera evnaríka Gudmund Nielsen, og við honum og hinum nýggju monnunum, hevði EB/Streymur styrkt hvørt einasta lið í ketuni.

## Pínir í Sundalagnum

Hetta hevur tó ikki verið til at sæð í ár. At eingin av nýggju monnunum er fallin til er eitt. Nakað annað, og nógv meiri avgerandi er, at restin av liðnum heldur ikki tykist at trívast á vøllinum í eins stóran mun og teir gjørdu í fjør.

Tískil er liðið í skrivandi stund at finna á einum fimta plássi í landskappingini, 13 stig aftanfyri oddaliðið HB.

Somuleiðis varð felagið sent so ruddiliga úr altjóða fótbólti í ár , tá EB/Streymur tapti tilsamans 5-0 fyri kypriotiska Apoel Nicosia.

Bjargingin upp á kappingarárið, sum higartil á ongan hátt hevði hepnast sum ætlað, skuldi vera finalan í kappingini um Løgmanssteypið. Men eisini her funnu sundalagsmenn sínar yvirmenn, og kappingarárið byrjar at líkjast eini katastrofu.

Prikkurin yvir tiltikna i'ið er, at sjálv ímyndin av EB/Streymi, landsliðsleikarin og liðformaðurin gjøgnum mong ár, Egil á Bø, ikki er partur av hópinum longur. Ósemjur við venjaran hava fingið annars siðiliga og róliga mannin at klamsa hurðina aftur eftir seg. Fyribils eitur tað, at henda hurð ikki verður latin upp aftur og at Egil á Bø er givin at spæla fótbólt.

Hetta nívir!

## Knotur í monnunum

Í Gøtu og Leirvík er hinvegin einans talan um gleði og gleim í hesum døgum. Steypasigurin staðfestir, at samanrenningin av GÍ og LÍF var røtt. Tað prógvar eisini, at Jógvan Martin Olsen dugir at sínar menn upp og at seta teir rætt á vøllin.

Ein teirra, ið valla mundi seta ein fót skeivan í finaluni í gjár, var Andreas Lava Olsen. Hann vísti veruliga, at hann er ein maður, ið øll mótstøðulið og ikki minst landsliðsvenjarin, skulu fylgja væl við, um tey annars megna hetta, tí leirvíkingurin er ein óhugnaliga kvikur maður. Tað sigur nevniliga ikki so lítið, at hann rennur Leif Niclasen av sær, tí norðskálamaðurin telist millum landsins skjótastu leikarar.

Andreas Lava Olsen er bara ein leikari. Víkingur hevur fleiri aðrar, sum í løtuni teljast millum landsins bestu á sínum plássi. Súni Olsen kenna vit og vita hvør dugir er í. Atli Gregersen vísti veruliga sínar dygdir sum stýrimaður í verjuni, har hann tók ábyrgd og vísti veg. Og í fremstu røð var ein maður, sum í ár hevur víst fleiri av somu dygdum, sum Arnbjørn Hansen vísti í fjør. Finnur Justinussen hevur higartil í landskappingini víst tað níggju ferðir, og hann vísti eisini einaferð í finaluni í gjár.

## Klárir frá byrjan

Um tað er áðurnevnda rumbul, ið sat í høvdinum á EB/Streymaleikarunum, tá Páll Augustinussen bríkslaði dystin í gongd, skal her vera ósagt, men teir vóru á ongan hátt eins klárir og Víkingar.

Illa nokk fyrsti minutturin var runnin, tá bólturin brast á tvørtræið omanfyri Gunnar á Steig, og seks minuttir seinni lá bólturin í netinum aftanfyri sama málverja.

Sama skil var, tá seinni hálvleikur byrjaði. Hesin var bara tríggir